

www.oljan.fo

**Jan Müller** 07 - 02 - 2013

# Atlantic Petroleum í uppskoti til virðisløn

Føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum var eitt av fýra av teimum nýggju oljufeløgunum á norska landgrunninum, sum nú um dagarnar varð útnevnt til virðislønina Gullkrúnan 2013. Henda útnevning varð gjørd eftir, at felagið keypti upp norska oljufelagið Emergy Exploration. Virðislønin, sum verður latin á hvørjum ári, fer til feløg, sum hava kunnað víst á okkurt serligt og virðismikið fyri norska oljuleiting í farna ári. Ben Arabo segði eftir útnevningina, at felagið var sera fegið um at vera millum feløgini, ið vórðu úttikin til henda sera høgt virðismetta prís. Hann vísir á, at felagið er í eini vakstrartíð, eftir at hava keypt fyrst Volantis og nú Emergy Exploration. Norski landgrunnurin vísir seg at goyma nógvar møguleikar komandi árini. Keypið av Emergy Exploration gav okkum ein góðan møguleika at lata dyrnar upp til Norra, og vit eru sjálvandi fegnir um, at henda avgerð okkara fær undirtøku í restini av norsku oljuvinnuni. Jonny Hesthammer, stjóri í Atlantic Petroleum Norge sigur, at Emergy Exploration hevur tryggjað Atlantic leitiloyvi og hevur bygt upp eina organisatión við professionellum fólkum, sum fer at kunna skapa nýggj virði í framtíðini. Yvirtøkan gjørd av tí fíggjarliga sterka Atlantic Petroleum fer at tryggja munandi virksemi á norska landgrunninum komandi árini. Og longu nú vísir keypið seg at hóska væl at skapa synergiir millum tvey feløg, sum nú eru løgd saman. Hini feløgini, sum Atlantic kappast við, vóru Tullow Oil, Cairn Energy og Explora Petroleum. Virðislønir verða latnar til ymiskar disiplinir so sum støðd á oljufeløgum, fyri at hava staðið fyri bestu leitingini og útbyggingini osfr. Tullow vann Úrslitið av virðislønartiltakinum gjørdist, at í bólkinum av nýggjum feløgum, har Atlantic Petroleum varð eitt av kosnu feløgunum, vann Tullow Oil, sum hevur gjørt eina lynkarrieru á fleiri oljumótum, eitt nú í Afrika. Sigast kann tó, at tað er eitt veruligt herðaklapp at fáa hjá føroyska felagnum at blíva javnmett við so kend feløg sum eitt nú

Tullow Oil og Cairn. Annars vann Bridge Energy virðislønina sum besta leitifelagið. Týska Wintershall fekk virðisløn fyri at hava dugað best at menna handilsliga virksemi sítt, Statoil vann virðisløn fyri at hava dugað best at ment sínar verkætlanir, og ConocoPhilips fekk virðislønina fyri bestu útbyggingina av søguliga og risastóra Ekofisk feltinum. Áhugavert er eisini at bíta merki í, at svenska Lundin, har fleiri føroyingar starvast høgt upp í fyrisitingini, eisini fekk virðislønir. Tað vóru tveir av royndu serfrøðingunum hjá felagnum, Hans Christen Rønnevik og Torstein Sannes fyri teirra arbeiði at fáa nýtt lív í gamlan part av landgrunninum við tí risastóra Johan Sverdrup fundinum. Tað er fyritøkan Rystad Energy, sum stendur fyri virðislønarhandanini. Norra er ein leiðandi leititjóð og er framvegis størsti offshoremarknaður í heiminum. Vit halda, at feløgini gera eitt sera gott arbeiði, og vilja vit eisini heiðra tey fyri tað sigur Jarand Rystad við aftenbladet.no. ?